Umstøðurnar hjá børnum og ungum:

# Autoritetarnir fram aftur úr skýmaskotum





*Fleiri kend andlit millum pallborðsluttakararnar*

**Vaksin mugu og skulu tora at seta mørk! Børn og ung hava brúk fyri fyrimyndum, góðum fyrimyndum! Og tað er mennandi fyri samskifti millum børn og vaksin at vera saman um okkurt, ið er meiningsfult fyri báðar partar. M.a. hetta kom fram á áhugaverdum fundi, sum sunnudagin varð í høllini á Sandoyar Meginskúla, har evnið var umstøður hjá børnum og ungum í dagsins samfelag**

BØRN OG UNG
*Tekstur: Eli Hentze*
*Myndir: Oskar Oskarson*

Síðstu vikuna serliga hevur nógv tos verið um umstøður hjá børnum og ungum í okkara samfelag. Leiðarin á Barnaheiminum, Finnur Helmsdal, hevur í fyrilestri sagt, at ov nógv børn og ung í okkara samfelag hava tað ikki gott. Fyrrverandi løgtingskvinnan, Rúna Sivertsen, hevur skotið upp, at útigongubann verður sett børnum og ungum á náttartíð. Hetta bert fyri at nevna tvey evni, ið hava verið uppi og vent hesar síðstu dagarnar.

Sunnudagin skipaði ein áhugabólkur úr Sandoynni fyri fyrilestrum og pallborði um júst børn og ung og teirra umstøður í dagsins samfelag. Eyðun Joensen, sálarførðingur, Marna Jakobsen, lærari, Sølvi Reinert Hansen, ÍSF ráðgevi og Jóngerð Poulsen, heilsufrøðingur hildu fyrilestur og mannaðu pallborðið.

Nakað av fólki var samankomið at lurta eftir, meðan stórir spurningar skuldu svarast. Millum annað varð spurt, um børn og ung eru slept upp á fjall, ella um tey vaksnu ikki duga at møta børnum og ungum, ið liva ein dag og í ein heim, sum bjóðar rúgvuvís av tilboðum av alskyns slag døgnið runt, og hvør tað er, sum skal uppala nýggj ættarlið?

Eyðun Joensen helt, at talan kundi ikki vera um storm í einum glasi, tá ið hesi viðurskifti í dagsins samfelag fingu so nógva umtalu. Og hóast nágreinilig tøl ikki finnast, ið fortelja okkum, at børn og ung hava tað verri, kundi hann staðfesta, at hann í sínum arbeiði sum sálarfrøðingur hevði sæð eitt vaksandi tal av yngri fólki við sálarsjúkum. Eg hugsi ikki um tey, ið bert hava fingið um skrúvuna, men tey, ið velja lívið frá. Tey eru vaksandi í tali. Hesi hava ómetaliga ilt í lívinum, og tey eri eg mest bangin fyri. Flest øll børn og ung í Føroyum hava tað gott, men gjógvin millum vælvirkandi og hini minni vælvirkandi gerst djúpri og djúpri, segði Eyðun Joensen m.a.

Jóngerð Poulsen tosaði um týdningin av at seta mørk. Hon helt, at vaksin í ov lítlan mun tora at seta mørk. Hon tosaði eisini um, hvussu týdningarmikið tað er at geva børnunum sjálvsvirði, hendan innara kenslan at hava virði, eisini hóast okkurt verður gjørt skeivt eftir vegnum, segði Jóngerð. Hon helt, at trupul børn finnast ikki, men at børn eru, ið hava tað trupult.

Marna Jakobsen legði áherðslu á týdningin at verja og virða børnini. Fyrilesturin tók støðið í eini kanning, ið amerikumaðurin Neil Postman sáli gjørdi um ávirkanina sjónvarpið hevði á børn og ung. Í hesi kanning sigur Neil Postman millum annað, at barndómurin hvarv, tá ið sjónvarpið var uppfunnið. Gjógvin millum ættarliðini smalkast alsamt, vísti Marna á. Tilkomin fólk vilja í klædnadrakt og útsjónd annars líkjast ungdómum, meðan smábørnini klæðast í sexut og hálvsexut klædnapløgg, segði Marna. Ongir loynidómar eru til! Øll ættlarliðini hava somu møguleikar at ogna sær somu vitan um øll lívsins viðurskifti. Trupulleikin er tann, at børnini ikki eru búgvin at taka støðu til øll lívsins viðurskifti, tí eiga vit vaksin at verja tey, segði Marna.

Sølvi Reinert Hansen greiddi frá bygnaðinum í ÍSF og legði áherðslu á týdningin ítróttarrørslan hevur fyri børn og ung í føroyska samfelagnum. Tað ókeypis arbeiðið, ið fer fram úti í feløgunum er av allarstørsta týdningi, segði Sølvi. Eisini vísti hann á, hvussu ein møgulig framtíð í ítróttarverðini hjá børnum og ungum fór at síggja út. Sølvi eftirlýsti einum greiðari og sjónligari ítróttarpolitikki frá kommunalari síðu. Í løtuni situr ein nevnd og orðar eitt ítróttarálit, segði Sølvi at enda.

Aftaná fyrilestrarnar varð lítil steðgur. Í steðginum fingu áhoyrararnir høvi at síggja frálíku framsýningina, ið børn og ung úr allari Sandoynni høvdu gjørt. Nógvir flottir málningar málaðir av dugnaligum, fittum, smáum barnahondum bóru boð um kreativar penslar.

Síðani var pallborð, har áhoyrararnir fingu høvi at seta spurningar.

Niðurstøða varð ongin, men eftir fundin sat man við tí kenslu, at fy-orðið autoritetur varð nevnt upp til fleir ferðir sum verandi sera avgerandi og neyðugt í samveruni millum vaksin, børn og ung. Vaksin mugu og skulu tora at seta mørk! Børn og ung hava brúk fyri fyrimyndum, góðum fyrimyndum! Og tað er mennandi fyri samskifti millum børn og vaksin at vera saman um okkurt, ið er meiningsfult fyri báðar partar.

Fyrireikararnir boðaðu frá, at tíðliga næsta ár verður skipað fyri einum barnafagnaðardegi.



*Høvi var eisini at síggja listaverkini hjá børnum og ungum*





*Arbeiðið at dýpa samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði er steðgað og byrjar í fyrsta lagi aftur um fýra viku.*
*Foto: Leivur Nyggard*

# Dýping av havnini í Trongisvági steðgað

**Landsverkfrøðingurin hevði gloymt at søkt um loyvi at søkkja botntilfarið longri úti á Trongisvágsfjørðinum. Arbeiðið er nú seinkað í minsta lagi fýra vikur**

AFTURSØKKING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Grabbarnir sum skulu dýpa nýggju havnina til Smyril í Trongisvági, noyddust at steðga í gjár. Og teir koma í fyrsta lagi i gongd aftur um fýra vikur.

Landsverkfrøðingurin hevur gloymt, at tilfar, sum verður tikið upp av havbotninum, ikki uttan víðari kann søkkjast aftur onkra aðrastaðni. Ein kunngerð um havumhvørvi sigur, at loyvi krevst fyri at taka tilfar upp av havbotninum og aftursøkkja tað.

Í gjár var Heilsufrøðiliga Starvsstovan varug við, at einki loyvi fyrilá til aftursøkking og steðgaði arbeiðinum beinanvegin.

Í dag hevur Landsverkfrøðingurin sent umsókn til Starvsstovuna, men ein slík kunngerð kann ikki avgreiðast í eini handavending.

- Hetta er fyrsta umsókn, sum er komin eftir kunngerðini, so vit mugu hugsa okkum um, men í næstu viku skuldi okkara arbeiði verið avgreitt, sigur Súni Petersen frá umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

### Seinkað í minst fýra vikur

Aftaná at Starvsstovan hevur givið loyvi skulu ganga fýra vikur, har einhvør kann kæra um avgerðina. Og verður kært, so kann arbeiði ikki byrja fyrr enn landsstýrismaðurin í Vinnumálum hevur tikið avgerð í kæruni.

- Hetta kemur sera illa við hjá okkum, tí vit hava so stutta tíð í forvegin, sigur Jón Danielsen, stjóri í Articon, sum ger arbeiðið á Trongisvágsfirði. Havnin skal vera klár til nýggja Smyril í november.

Landsverkfrøðinhgurin er byggiharri og eigur at hava øll loyvi í lagi, men í hesum førinum hevur hann gloymt kunngerðina frá Oljumálaráðnum.

Byggileiðsluna hevur HMP Consult um hendi, men teir hava onga viðmerking yvirhøvur til, at arbeiðið er steðgað.

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, sigur seg ivast í, um tað er skyldan hjá teimum at søkja um loyvið. Hann heldur, at tað eigur at vera byggifelagið.

Men kortini er tað byggieftirlitið - HMP Consult - sum søkir um loyvi vegna Landsverkifrøðingin. Byggifelagið Articon hevur ikki søkt um nakað loyvi.

# Skeið í hundavenjing



*Umframt undirvísing í tí ástøðiliga, verður á skeiðnum eisini farið út at síggja, hvussu seyðahundar bera seg at, tá teir reka*

**Tað eru ótrúligir møguleikar við einum væl vandum hundi. Á skeiðnum, sum verður á Hotel Norð komandi leygardag, fer at verða undirvíst í viðferð, venjing og nýtslu av seyðahundinum**

HUNDAVENJING
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Komandi leygardag fer Absalon Hansen at hava skeið á Viðareiði í venjing av seyðahundum.

Saman við Absalon luttaka eisini nevndarlimir úr seyðahundafelagnum.

Ein av stigtakarunum til skeiðið er, Jákup Jacobsen í Haraldsundi.

- Orsøkin til, at vit hava tikið stig til eitt slíkt skeið er fyri at vísa á, hvussu einastandandi ein vælvandur seyðhundur kann vera, og hvat hann kann avrika, sigur hann.

Áhugin at venja seyðahundar er vaksandi, og fyriskipararnir vóna at fáa nógv burturúr skeiðnum.

Absalon Hansen hevur í nógv ár havt stóran áhuga í hundavenjing, og hevur eitt nú, verið í Skotlandi og hugt at, hvussu teir venja seyðahundar har.

Skeiðið byrjar klokkan 9, og inntil døgurða verður undirvíst í tí ástøðiliga.

Á døgurða verður borðreitt við lunda, og so verður farið út at síggja, hvussu seyðahundar reka.

Seinasta freist at tekna seg til skeiðið, sum kostar 400 krónur, er mikudagin, 26.novembur.

Tey, ið ynskja at tekna seg til skeiðið, kunnu ringja á tlf. 456787 ella 756787.